# Hoyvíkar Skúli



# Skúlaárið 2011-2012

**Hoyvíkar Skúli**

**Góðu næmingar og góðu foreldur!**

Vælkomin aftur í skúla!

Skúlaárið 2011-2012 stendur fyri framman. Vónandi var summarfrítíðin góð, og vónandi gleða øll seg til at koma aftur í skúla.

Í faldaranum, sum tú situr við, stendur eitt sindur um skúlan.

Í 2005 kom nýggj reglugerð í gildi. Hon stendur í hesum faldaranum. Endamálið er at fáa skúlan at virka væl, og at øll skulu hava møguleika at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini. Í reglugerðini stendur, hvat vit vænta okkum av næminginum.

Tað hevur týdning, at øll taka hesa reglugerð í álvara og liva eftir henni. Vit í skúlanum hava ábyrgdina av øllum tí, sum hevur við skúladagin at gera. Heimið hevur ábyrgdina av, at næmingurin kemur væl fyri og væl fyrireikaður í skúla. Saman eiga vit at lyfta støðið.

Eg fari at heita á tykkum um at lesa reglugerðina og annars alt, sum stendur í hesum faldara.

Eftir er bara enn einaferð at siga við øll: Hjartaliga væl afturkomin í skúla. Og tit sum koma fyrstu ferð, bæði næmingar og foreldur: Hjartaliga vælkomin.

Við vón um eitt gott og gevandi skúlaár 2011/2012

Birgit Arge, skúlastjóri.



**Telefonir**

Skrivstova 30 25 90
svarar allar skúladagar kl. 8.00 -13.30

Lærarastova 30 20 29 lok 1536
Telefaks 30 25 91 (Hoyvíkar Skúli)
Telefaks 30 25 93 (Hoyvíkshøllin)
Teldupostur hoy@skulin.fo

Heilsusystirin 30 25 92 (týsdag og hósdag)
Frítítíðarskúlin 30 23 72 / 25 64 84 / 25 60 84

Skúlin hevur heimasíðu. Adressan er:
www.skulin.fo/hoy

## Skúlaárið

Skúlaárið byrjar mánadagin 15. august.
2.-9. fl. møta klokkan 10.
1. fl. møtir klokkan 12.

## Frítíðarætlan

| | |
|---|---|
| Heystfrítíð: | leygardagin 08.10 – sunnudagin 16.10 |
| Jólafrítíð: | leygardagin 17.12 – mánadagin 02.01 |
| Páskafrítíð: | leygardagin 31.03 – sunnudag 15.04 |
| Flaggdagur: | mikudagur 25.04 |
| Dýri Biðidagur: | fríggjadagin 04.05 |
| Kr. Himmalsferðardagur: | hósdagin 17.05 |
| Hvítusunnufrítíð: | leygardagin 26.05 – mánadagin 28.05 |
| Grundlógardagur: | týsdagin 05.06 |
| Summarfrítíð: | fríggjadagin 29.06- sunnudagin 19.08 |

Allir nevndu dagar vera roknaðir sum frídagar.
Í skúlaárinum eru 3 dagar til taks, ið skúlamyndugleikarnir á staðnum kunnu brúka sum frídagar. Í hesum skúlaárinum verða teir lagdir aftrat páskafrítíðini.

## Skrivliga próvtøkan

Skrivliga próvtøkan byrjar mánadagin 14. mai og endar týsdagin 22. mai 2012. Munnligu próvtøkurnar verða í tíðarskeiðinum frá mánadegnum 11. juni til hósdagin 28. juni, báðir dagar íroknaðir.

## Landsroyndirnar

Landsroyndin í 4. flokki verður 12. og 13. mars 2012.
Í 6. flokki verður landsroyndin 14., 15. og 16. mars 2012.

## Lærarar á skeið

Nám skipar í hesum skúlaárinum fyri skeiði í samvirknum talvum fyri allar lærarar. Okkara lærarar skulu á skeið 17. og 18. november. Tá fáa næmingarnir frí.

## Lærarar / starvsfólk

| | |
|---|---|
| Birgit Arge, skúlastjóri | 31 19 26 / 22 76 03 |
| Ólavur á Skipagøtu, varaskúlastjóri | 31 76 54 / 21 76 54 |
| Anna Maria Nolsøe | 31 76 94 |
| Annika við Skipá, flokslærari 9.fl | 31 39 99 |
| Arnbjørn Sivertsen | 31 91 42 |
| Árna Højgaard, flokslærari 6.B | 31 20 22 |
| Ásla Huusgaard, serlærari | 31 42 80 |
| Barbara Eysturdal Huusgaard, flokslærari 6.A | 58 53 52 |
| Birita Weihe | 31 95 13 |
| Bjørg Pállson | 31 58 30 |
| Cathrina Jacobsen, námsfrøðingur | 22 43 34 |
| Charla Rasmussen, námsfrøðingur | 31 51 50 |
| Edvard Nielsen, telduvørður | 31 05 41 |
| Eileen Jacobsen, flokslærari 7.A | 31 01 58 |
| Eydna Høgnesen | 42 25 61 |
| Gunnvør Eyvindsdóttir Mohr | 32 16 15 |
| Hartmann Joensen, flokslærari 4.fl | 42 29 62 |
| Heini Nygaard, telduvørður (farloyvi) | 31 90 35 |
| Henning Tausen, skúlabókavørður (farloyvi) | 31 65 84 |
| Ingrid Patursson (farloyvi) | 31 67 69 |
| Ingun Simonsen | 31 77 82 |
| Jacoba Funding | 31 56 65 |
| Jórun Olsen | 31 43 77 |
| Kristbjørg Olsen | 31 05 05 |
| Lisa Hendriksdóttir (farloyvi) | 28 40 00 |
| Maibritt Svabo Egholm | 31 78 89 |
| Malan Mohr, flokslærari 5.A | 31 33 43 |
| Manne Persson, álitismaður | 31 59 11 |
| Margith Lamhauge, flokslærari 8.A | 25 83 04 |
| Maria Ennistein Holm, flokslærari 7.B | 31 68 80 |
| Mariann Jacobsen | 31 39 61 |
| Oluf Muller | 21 64 53 |
| Petra Erlingsdóttir | 31 76 80 / 21 76 80 |
| Pól Hentze | 31 60 16 |
| Ragnar Rubeksen | 32 11 81 |

| | |
|---|---|
| Roymer Lamhauge, stuðul | 31 56 17 |
| Sanna Hentze, flokslærari 5.B | 51 61 14 |
| Sára Weihe | 31 84 25 |
| Sóleyð Holm | 31 03 85 |
| Søren Pedersen | 25 98 97 |
| Vinnie Toftegaard, flokslærari 8.B | 31 90 34 |
| Verner Hansen | 31 28 82 |

**Skúlatænarar:**

| | |
|---|---|
| Jóhan Poulsen | 28 14 73 |
| Bjørn Hansen | 28 22 03 |

**Skrivari:**

| | |
|---|---|
| Katrin Nolsøe | 27 24 13 |

**Heilsusystir:**

| | |
|---|---|
| Marjun av Steinum | 30 25 92 |

## Skúlastýrið fyri Hoyvíkar Skúla

**Umboð fyri foreldrini:**
Bergtóra H. Joensen, Hákunargøta 10, 188 Hoyvík, formaður
Turið H. Magnussen, Djúpagilsvegur 30, 188 Hoyvík, næstformaður
Niels Winther Poulsen, Millum Gilja 8, 188 Hoyvík

*Eykavald umboð fyri foreldrini:*
Helle T. Johansen, Kristiansgøta 8, 188 Hoyvík.
Jonhard Klettheyggj, Jørundargøta 31, 100 Tórshavn

**Umboð fyri lærararnar:**
Oluf Muller, Kvívík
*Eykaumboð fyri lærararnar:*
Malan Mohr, Oman Stóragarð 9, 100 Tórshavn

Birgit Arge, skúlastjóri, skrivari.

**Umboð fyri kommununa:**
Jan Christiansen
Jógvan Arge

**Foreldraráð:**
Skúlin hevur eitt foreldraráð við tveimum umboðum úr hvørjum flokki.
Hesi verða vald á 1. foreldrafundi í skúlaárinum.

## Eitt sindur um skúlan

2 spor eru í 1. - 8. flokki, tó er 1 spor í 4. flokki. 1 spor er í 9. flokki. Við skúlaársbyrjan eru innskrivaðir 326 næmingar. Skúlaárið 2011 - 2012 starvast 35 lærarar, 2 námsfrøðingar og 1 stuðul í skúlanum.

Flokkarnir eru her:




Í nýggja bygninginum, sum er til innskúling og frítíðarskúla, ganga 1. og 2. flokkarnir.

## Úr dagsskránni
## Skúladagurin er býttur soleiðis:

| | |
|---|---|
| **1.& 2. tími:** | **kl. 08.00 - 09.30** |
| *Fríkorter:* | *kl. 09.30 - 09.50* |
| **3. & 4. tími:** | **kl. 09.50 - 11.20** |
| *Matarsteðgur:* | *kl. 11.20 - 11.30* |
| *Fríkorter:* | *kl. 11.30 - 11.50* |
| **5. & 6. tími:** | **kl. 11.50 - 13.20** |
| *Fríkorter:* | *kl. 13.20 - 13.30* |
| **7. tími:** | **kl. 13.30 - 14.15** |
| *Fríkorter:* | *kl. 14.15 - 14.25* |
| **8. tími:** | **kl. 14.25 - 15.10** |



## Fríkorterini

- Høvuðsreglan er, at børnini altíð eru uttandura í fríkorterunum. Lærararnir fylgja børnunum út, síðani taka garðvaktirnar yvir og gera av, um børnini skulu vera úti alt fríkorterið ella ikki. Framhaldsdeildin hevur inniloyvi.

## Matarsteðgur og mjólk

- Næmingar, sum hava tímar eftir døgurða, eiga at hava matpakka við í skúla. Tað ber til at keypa mjólk til matarsteðgin, og skúlin hevur eina matarskipan, har næmingarnir kunnu keypa frukt. Køliskáp er í øllum stovunum.

## Úr vikuskránni

- Felags morgunsangur er hvønn fríggjadag klokkan 9.15.
  Flokkarnir skiftast um at skipa fyri morgunsanginum.



## Úr ársskránni

- Við skúlaársbyrjan fáa næmingarnir ein faldara, sum sigur frá teimum týdningarmestu viðurskiftunum í skúlanum.
- Í adventini verður skipað fyri einum felags degi, har øll pynta skúlan.
- Ein av seinastu døgunum fyri jól er felags kirkjugongd.



- Fyri jólafrítíðina er felags jólahald á skúlanum.
- Millum jól og føstu fara vit upp á gólv og kvøða.

- Á føstulávint er felags føstulávintshald.



- Móti sumri verður skipað fyri útferðum fyri 1. - 2. - 3. og 4. flokki. Fyri 5. - 6. - 7. og 9. flokki verður skipað fyri seturskúla.

- Ein av síðstu døgunum fyri summarfrítíðina hava vit felags ítróttardag.



- Seinasta vikan fyri summarfrítíðina er skemafrí. Flokslærarin ger av, hvussu vikan verður nýtt.

- Eina viku um várið er evnisvika. Evni og vika verða kunngjørd seinni.

- Einaferð um árið hava vit felags lesiløtu.

- Várkonsert verður eitt kvøld í mai.

# Ymiskt

## Flokslærarar og lægaratoymi

Í hvørjum flokki er eitt læraratoymi, sum leggur til rættis undirvísingina í flokkinum. Ein av lærarunum er flokslærari. Tað er hann, sum tekur sær av mesta samskiftinum millum heim og skúla. Í innskúlingina skipar læraratoymið seg soleiðis, at lærararnir býta flokkin ímillum sín.

## Røklar

Skúlin hevur røklaskipan í hvørjum flokki, har næmingarnir læra at hava ábyrgd. Krøvini til røklarnar vaksa við árunum.

## Skúlabøkur

Allar skúlabøkur, sum næmingarnir læna úr skúlanum, eiga at verða bundnar inn heima. Um bøkur av einhvørji orsøk ikki verða latnar innaftur, eigur næmingurin at bera skúlanum eina nýggja bók.

## Skúlaamboð

Næmingarnir keypa sjálvir heftir og hava ábyrgd av, at penalarhúsið inniheldur tey neyðugu amboðini.

## Vikuætlan

Allir flokkar nýta nú vikuætlan. Seinasta skúlaár byrjaðu vit at gera vikuætlanirnar teldutøkar.

## Frítímar

Tað hendir, at næmingar ongan lærara hava onkran tíma. Hetta kann standast av, at lærari er sjúkur ella á skeiði, og eingin annar lærari er til taks. Summir næmingar møta eisini, áðrenn skúlatíð teirra byrjar um morgunin. Tá soleiðis er, eru næmingarnir bidnir um at vera friðarligir í floksstovuni.



## Gloymd klæðir / gloymdir lutir

Á skúlanum liggja ofta gloymd klæðir og annað. Um navn er í klæðunum, er lættari at halda skil á. Gloymd klæðir verða løgd fram av og á. Boðað verður frá í brævi heim áðrenn.
Gloymdir lutir verða lagdir í eitt skáp uttan fyri lærarastovuna.

## Skúlamyndir

Skúlin skipar fyri, at skúlamyndir verða tiknar í 1., 4. 7. og 9. flokki hvørt ár.





**Fartelefonir**

Nú er rættiliga vanligt, at næmingar hava fartelefon við í skúla.
***<u>Tað er ikki loyvt at nýta fartelefonina í tímunum</u>***. Ger næmingur hetta kortini, fær hann eina ávaring. Hendir tað aftur, verður telefonin tikin, og foreldrini kunnu heinta hana hjá skúlastjóranum.

**Gevið gætur:**
**Summir næmingar hava telefon við, har tað ber til at taka myndir og ljóð. Hetta hevur havt óhepnar fylgjur við sær.**
**Hava vit varhugan av, at telefonin verður misnýtt á henda hátt, verður hon beinanvegin tikin frá næminginum. Ringt verður heim, og foreldrini kunnu heinta telefonina á skrivstovuni hjá stjóranum.**
**Næmingurin sleppur ikki at hava telefonina við aftur í skúla.**

**Fráverur**

Um næmingur er sjúkur, eigur hann at hava skrivlig boð um fráveruna við heimanífrá, tá ið hann kemur aftur í skúla. Skal ein næmingur hava frí í meira enn 2 dagar, skal loyvi fáast frá skúlastjóranum.
***Gevið gætur:***
***Tað er sera óheppið fyri næmingar, lærarar og flokkarnar at næmingar eru burturstaddir í skúlatíðini. Vit heita á foreldrini at leggja frítíðina til rættis soleiðis, at skúlagongdin hjá næmingunum ikki verður órógvað óneyðugt.***

## Ymiskt

Tað er strangliga bannað at hava við sær leikur, knívar o.a, ið kann vera til ampa fyri onnur.

## Tilbúgvingarætlan um sorg

Í skúlaárinum 2000-2001 gjørdi skúlin eina tilbúgvingarætlan fyri skúlan í samband við álvarsliga sjúku, vanlukku, deyða ella annan miss. Faldari er skrivaður, og tað ber til at fáa eitt eintak við at venda sær til skúlan.

## Trivnaðarætlan

Skúlin hevur eina trivnaðarætlan at fyribyrgja happing.

## Samrøðubløð til viðtalur

Hoyvíkar Skúli leggur stóran dent á samstarvið við heimini, og vit nýta samrøðubløð, sum verða send heim áðrenn viðtalurnar.

## Lús!

Lús er ein afturvendandi trupulleiki í skúlanum. Hevur ein næmingur fingið lús, verða foreldrini biðin um at boða skúlanum frá. Tá fáa allir næmingarnir í flokkinum bræv heim, har foreldrini verða biðin um at kanna sítt barn.
Næmingur, sum ikki er kannaður, eigur ikki at koma í skúla.
Nýggj leiðbeining um fyribyrging og viðgerð móti lús er komin frá Sundhedsstyrelsen. Øll leiðbeiningin kann lesast á
www.dpil.dk

Í 2005 kom nýggj reglugerð í gildi.

Hon er prentað her.

Vinarliga lesið og tosið um hana saman við næminginum.

Fyrri partur er ein útgreinan av hvørjum einstøkum øki.

Seinni parturin (s.21) eru teir ítøkiligu setningarnir, sum hanga í skúlastovuni, og sum næmingurin skal halda seg til.

# Hoyvíkar Skúli
## - soleiðis gera vit

| 6 góðir setningar um Hoyvíkar Skúla | Virði, sum vit leggja dent á |
|---|---|
| • Í Hoyvíkar Skúla samstarva heim og skúli<br>• Vit møta stundisliga og fyrireikað<br>• Vit virða hvør annan og ganga væl um skúlan og umhvørvið<br>• Vit eru íðin, høvisk og fyrikomandi<br>• Vit læra hvønn dag<br>• Inni er altíð arbeiðsfriður | • Trivnaður<br>• Medábyrgd<br>• Samstarv<br>• Undran og forvitni<br>• Karmar<br>• Virðing |

**Hvat leggja vit í virðini:**

Trivnaður: Vit ynskja, at í skúlanum skal ein positivur andi valda. Vit hava skyldu til at skapa umstøður fyri trivnaði og menning hjá øllum, sum virka í skúlanum.

Medábyrgd: Øll kenna sína ábyrgd í skúlanum. Medábyrgd og ávirkan fylgjast.

Samstarv: Vit ynskja eitt opið og virðiligt samstarv millum næmingar, starvsfólk og heimini.

Undran og forvitni: Vit ynskja eitt kveikjandi umhvørvi, sum innbjóðar til menning og vitan bæði fakliga og kreativt.

Karmar: Karmarnir í skúlanum eru tryggir, sjónligir og álítandi.

Virðing: Virðingin fyri hvør øðrum og umhvørvinum liggur til grund fyri øllum virksemi í skúlanum.

Út frá hesum setningum og virðum hevur skúlin gjørt eina nýggja reglugerð, sum fær gildi frá 15. august 2005

| | |
|---|---|
| **Uppmøting**<br>Tað hevur stóran týdning, at næmingarnir eru í skúla allar skúladagar. Í góðari tíð boðar skúlin frá, nær frídagarnir eru, so heimini kunnu leggja ferðir og annað til rættis. Flokslærarin kann geva næmingum frí einstakar tímar og upp til tveir dagar. Bert skúlans leiðsla kann geva næmingi frí longri enn tveir dagar.<br>Næmingarnir skulu møta til tíðina. Um teir hava verið burtur úr skúlanum, skulu teir hava seðil við heimanífrá. | Tú skalt møta í skúla og til allar tímar til tíðina. |
| **Skúladagurin í tímunum**<br>Hvør flokkur hevur sína skúlastovu, og harumframt eru felagsøki til øll at nýta. Hesi eru námsfrøðiligi tænastudepilin, pyramiduhøllin, næmingaverkstaðurin og geingirnar. Í tímunum má arbeiðsfriður valda.<br>Skúlin hevur serstovur til H&L, náttúru/tøkni, lesiskeið o.a.<br>Um lærari er burturstaddur, og eingin lærari er at seta í staðin, skal flokkurin vera inni í skúlastovuni, um teir ikki fáa onnur boð. | Tú sleppur at arbeiða í øllum felagsøkjunum, har og nær lærarin gevur tær loyvi.<br><br>Námsfrøðiligi tænastudepilin og serstovurnar skulu vera ruddaðar, tá tú fert frá teimum. |
| **Fríkorterini**<br>Reglan er tann, at næmingarnir skulu út í skúlagarðin í fríkorterinum. Hetta er best fyri teir. Men er veðrið ov ringt at fara út, hava teir loyvi at vera inni í skúlastovuni ella í felagsøkjunum. Tó við ávísum fyritreytum. Tað er loyvt at hugna sær við friðarligum spølum. Ófriðarlig spøl, eitt nú bóltspøl eru bara loyvd uttandura.<br>Garðvaktir ansa eftir næmingunum.<br>Tað er neyðugt at øll vísa fyrilit. | Í fríkorterinum fert tú út í skúlagarðin at spæla.<br><br>Í ringum veðri er loyvt at vera inni.<br><br>Grønt flagg merkir ÚT<br>Reytt flagg merkir TAÐ ER LOYVT AT VERA INNI |

| | |
|---|---|
| | Alt spæl skal vera soleiðis, at tað verður ongum at meini og ikki tarnar øðrum at spæla.<br><br>Inni er bara friðarligt spæl.<br>Hevur tú hug at renna, spæla bólt, hoppa band og líknandi, eigur tú at fara út í skúlagarðin.<br><br>Tú skalt halda teg á skúlaøkinum allan skúladagin. |
| **Matarsteðgur**<br>Næmingar, sum eru í skúla seinnapart, eiga at hava matpakka við. Tað ber til at melda seg til matarskipan á skúlanum. | Í matarsteðginum situr tú í skúlastovuni og etur.<br>Eftir matarsteðgin ruddar tú upp eftir tær. |
| **Røklaskipanin**<br>Allir flokkar hava røklaskipan.<br>Røklarnir skulu halda stovuna ruddiliga, lufta út eftir hvønn tíma, og tá skúladagurin er av.<br>Harumframt eru røklar á felagsøkjunum og uttanfyri. Hesir skifta millum teir ymisku flokkarnar. Teir ansa eftir, at øll rudda upp eftir sær, og at felagsøkini eru vøkur og ordilig. | Røklarnir hava skyldu at gera røklaarbeiðið væl og virðiliga.<br>Sí vegleiðing fyri røklarnar. |
| **Atburður**<br>Vit vænta, at næmingarnir sýna ein góðan atburð og nýta ein góðan málburð móti hvør øðrum og starvsfólki.<br>At fyribyrgja happing verður undirvíst í Stig fyri Stig í øllum flokkum. | Tú vísir góðan atburð móti øllum.<br><br>Tú tosar hampuliga við øll.<br><br>Happing er ongantíð í lagi. |

| | |
|---|---|
| **Umhvørvi**<br>Vit hava øll ábyrgd av felagsøkjunum, og øll mugu fara væl um alt, sum skúlin eigur. Vit ynskja, at næmingarnir skulu hava ein skúladag í einum kveikjandi umhvørvi við avbjóðingum, har teir fegnast og undrast og leita sær svar uppá spurningar.<br>Men skal hetta eydnast, er neyðugt, at øll geva umhvørvinum ans og hvør øðrum arbeiðsnáðir. | Tú skalt fara væl um og geva tær sjálvum og øðrum arbeiðsnáðir.<br><br>Alt, sum skúlin eigur, er eisini títt. Tú hevur medábyrgd av øllum.<br><br>Alt rusk skal í ruskíløtini. |
| **Undirvísingartilfar og annað**<br>Næmingarnir fáa neyðugar bøkur frá skúlanum at brúka. Einnýtisbøkurnar eigur næmingurin, hinar bøkurnar og annað tilfar er at rokna sum lán. Pappír skal leggjast um bøkurnar, og heimið hevur ábyrgd av, at farið verður væl við øllum.<br>Endurgjald kann verða kravt, um okkurt verður burtur ella oyðilagt. | Tú eigur at fara væl við øllum, sum tú fært ella lænir úr skúlanum. |
| **Ymiskt**<br>Næmingar kunnu hava fartelefon við í skúla, um foreldrini halda tað vera neyðugt, men hon skal vera sløkt í tímunum, og tá lærarin gevur boð um tað.<br>Um telefonin verður misbrúkt í skúlanum, verður hon tikin frá næminginum og borin inn á stjóraskrivstovuna. Har kunnu foreldrini heinta hana.<br><br>Royking er ikki loyvd. | Fartelefonir og annað skal vera sløkt í tímunum, og tá ið lærarin sigur tað.<br><br>Royking er ikki loyvd. |

Um næmingur ikki heldur seg til omanfyri nevndu reglur, verður henda mannagongd nýtt:

1. Lærarin tosar við næmingin/næmingarnar um trupulleikan.
2. Um hetta ikki hjálpir, vendir lærarin sær til flokslæraran, sum tekur yvir. Møguliga saman við toyminum. Tosað verður við næmingin.
3. Er hetta ikki nóg mikið, vendir flokslærarin sær til heimið.
4. Heldur flokslærarin tað vera neyðugt at gera meira við málið, letur hann tað til leiðsluna.
5. Leiðslan tekur yvir. Tosar við næmingin og vendir sær møguliga til heimið.

Um næmingur sýnir sera óhøviskan atburð, kann hann verða vístur beinleiðis til leiðsluna, sum ger av, hvat verður gjørt í tí einstaka førinum.

- Tú skalt møta í skúla og til allar tímar til tíðina

- Tú sleppur at arbeiða í øllum felagsøkjunum, har og nær lærarin gevur tær loyvi
- Námsfrøðiligi tænastudepilin og serstovurnar skulu vera ruddaðar, tá tú fert frá teimum

- Í fríkorterinum fert tú út í skúlagarðin at spæla
- Í ringum veðri er loyvt at vera inni
- Grønt flagg merkir ÚT – reytt flagg merkir TAÐ ER LOYVT AT VERA INNI
- Alt spæl skal vera soleiðis, at tað verður ongum at meini og ikki tarnar øðrum at spæla
- Inni er bara friðarligt spæl. Hevur tú hug at renna, spæla bólt, hoppa band og líknandi, eigur tú at fara út í skúlagarðin
- Tú skalt halda teg á skúlaøkinum allan skúladagin

- Í matarsteðginum situr tú í skúlastovuni og etur. Eftir matarsteðgin ruddar tú upp eftir tær

- Røklarnir hava skyldu til at gera røklaarbeiðið væl og virðiliga Sí vegleiðing fyri røklarnar

- Tú vísir góðan atburð móti øllum
- Tú tosar hampuliga við øll
- Happing er ongantíð í lagi

- Tú skalt fara væl um og geva tær sjálvum og øðrum arbeiðsnáðir
- Alt, sum skúlin eigur, er eisini títt. Tú hevur medábyrgd av øllum
- Alt rusk skal í ruskíløtini
- Tú eigur at fara væl við øllum, sum tú fært ella lænir úr skúlanum
- Fartelefonir og annað skal vera sløkt í tímunum, og tá lærarin sigur tað
- Royking er ikki loyvd

## Ivamál

Eru foreldur í iva í onkrum viðvíkjandi skúlanum, eru tey vælkomin at seta seg í samband við skúlan.



## Heimasíðan

Á heimasíðuni hjá skúlanum www.skulin.fo/hoy ber til at lesa meira um skúlan.

